gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Blaðið og summarið

## *Oddagrein*

FYRI nógvum árum síðani løgdu fleiri av føroysku bløðunum heilt stilt um summarið. Okkurt blað minkaði um útgávurnar, okkurt um síðutalið. Eisini loftmiðlarnir plaga at minka um virksemi hesa tíðina á árinum. Vit minnast eisini, at Sjónvarpið eitt skifti heilt gavst at senda Dag og Viku um summarið.

NÚ lesararnir eru vanir við at fáa nøkur bløð nærum hvønn dag, so ber heldur ikki til at kappa á stokkinum. Tí koma bæði Dimmalætting og Sosialurin út fimm dagar um vikuna eisini í summarfrítíðini tó við minni síðutali. Her á blaðnum hava vit so roynt at hava so frægt av fólki til arbeiðis, at lesarar okkara kunnu fylgja við í tí, sum fyriferst í samfelagnum. Hóast fólk hava summarfrí og virksemi í landinum er minkað nógv, so liggja samfelagshjólini heldur ikki heilt still. Og fyri tað at løgtingið er farið í summarfrí, so hendir kortini ymiskt á tí politiska økinum, sum eisini pressan má fylgja við í. M.a. tí kemur Sosialurin út sum vant.

SUM lesarar okkara hava lagt til merkis, verður blaðið nú lutvíst prentað í litum. Hetta hendir eftir at Sosialurin og Dimmalætting eru farin í samstarv um felags prentsmiðju. Umleggingin til litprent setir stór krøv til arbeiðsplássið. Arbeitt verður nú miðvíst við hesi umlegging - samtíðis sum blaðið eisini fer at fáa nýtt layout tvs. at blaðið einaferð eftir summarsteðgin fer at koma út í nýggjum sniði. Ætlanin við hesum stigi er at gera blaðið meira lesilig, áhugavert og spennandi fyri lesaran. Hvat viðvíkur litprentinum, so metir leiðslan á blaðnum tað vera neyðugt at taka hetta stóra stig, fyri eitt nú at ganga okkara lýsarum á møti.

TAÐ er okkara sannføring, at lesararnir og viðskiftafólk annars fara at taka umrøddu broytingar sum eina positiva avbjóðing, sum aftur kann vera við til at menna føroyska blaðheimin, gera hann meira spennandi og áhugaverdan. Samtíðis sum eitt nýtt og møguleikagevandi grundarlag verður lagt verður alstórur dentur lagdur á at menna tann redaktionella tvs. innihaldsliga partin av blaðnum. Í løtuni eru fleiri av „innleggunum“ í blaðnum so sum vikuskiftisinnleggið, Hygg og Hoyr, Yngd o.a. í summarfrí. Tá hesi innlegg aftur verða náttúrligur partur av blaðnum í heyst, verða tey við til at geva lesarum eina enn meira fjølbroytta vøru.

VIT eiga ikki at gloyma ta orðaskifti, sum dagliga er í føroysku bløðunum. Ein av orsøkunum til, at vit ikki skerja niður útgávurnar hesa tíðina er eisini tann, at vit meta tað týdningarmikið fyri samfelagið sum heild, at orðaskiftið kann halda fram. Tí er tað vón okkara, at føroyingar eisini hesa tíð halda fram við tí dialogi, ið er so týdningarmikil fyri samfelagsgongdina. So Sosialurin er opin fyri øllum meiningum eisini í summartíðini.

VIT fara við hesum at ynskja øllum føroyingum eina góða summarferiu við vón um, at blaðið kann bera tykkum tíðindi og annað úr Føroyum, har tit enn eru stødd í heiminum. Vit eiga heldur ikki at gloyma teir framúr góðu møguleikar sum Internet-Sosialurin gevur føroyingum burturi sum heima.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Er tað demokrati, Steinbjørn B. Jacobsen?

*»Royn ikki at gera nakað í móti øðrum, sum tú ikki hevði brýggja teg um, at onnur gjørdu í móti tær«*



Henda reglan koma mær til hugs, tá eg las grein tygara »Eitt ljóst hár« í Dimmu hósdagin 6. juli.

Í byrjanini í greinini siga tygum: »gamalt varð sagt, at eingin ær var so svørt, at ikki okkurt ljóst hár fanst.«

Tað er heilt ótrúligt, sum ein kann skjóta »plett« uttan at vita hvønn ein skjýtur eftir. Mær fyrikemur tygara skriving sum eitt slag av einmansavriki. Ja, tað ljósa hárið eru tygum, men, alt er svart svart og aftur svart , og hóast hetta, er alt so sólaklárt.

Orsøkin til, at eg her taki til orðanna er tygara »herferð« ímóti Javnaðarflokkinum, hann ið er so ódemokratiskur, at hann ikki vil, sum tygum vilja. Tað skal verða eitt mark fyri, hvussu langt ein skal fara í síni herferð. Alt føroya fólk er væl vitandi um, at tygum eru fyrrverandi lærari og háskúlastjóri, har tygum kundu hava einvegis samrøður við næmingarnar og har *hava møguleikan* at stýra hvat hvør kundi siga og gera. Tað var ikki hildi at verða ódemokratiskur framferðarháttur — tí soleiðis var tað bara.

Tygum skriva. at tað er *»kanska ov nógv forlanga at Javnaðaflokkurin* skal *verða fyri fullveldinum«*.Ja, heilt erligt, hvat munnu tygum halda demokrati verða. Trúgva tygum, at Javnaðarflokkurin er stoltur av Nýrup, nei, men fyri tað er tað ikki ein sjálvfylgja, at fullveldisfólk kunnu *forlanga* at Javnaðarflokkurin *skal* verða fyri fullveldinum.

Millum okkum uttanfyri standandi var í byrjanini av hesum samgonguskeiðnum tosa nógv um, hvussu sterkur H. Hoydal var, ikki geva Javnaðarflokkinum skyldina fyri tvørligu støðuna hjá donsku stjórnini, men vit vita væl, at hetta hevði verið freistandi fyri hann. Í allari perioduni, har hann *ikki* »brúkti« Javnaðarflokkin til syndabukk, var hann samstundis semjusøkjandi.

Tað løgna við støðuni í dag er nevnliga tann, at fullveldisfólki - tygum og H. Hoydal íroknaðir - geva nú Javnaðarflokkinum skyldina fyri fastlæstu støðuna. Hvat er tað fyri demorkrati, har ein velur út úr rúgvuni, hvør skal verða syndabukkur. Er tað demokrati, Steinbjørn B. Jacobsen ?

Tygum sitera ta nógv virdu Enmandsavisen hjá háskúlastjóranum Poul Erik Søe, men Steinbjørn - ver fullvísur í, at harra Poul Erik Søe skrivar heiðurligt og reiðuligt, og gevur ikki Javnaðarflokkinum skyldina fyri fæstlæstu støðuna. Hetta endurgeva tygum sjálvur í greinini: *»og de færøeske sosialdemokrater har altid villet samhørighed med Danmark«*; kom nú ikki næstu ferð og endurtak, at tað er ódemokratiskt at verða fyri 'samhørighed' við Danmark.

Tað er óhøviskt, skammuiligt, óvirðiligt, ófólkaligt og ikki sørt nasadjarvt av tygum, at kalla tað ódemokratist, at ein flokkur ynskir ein betri heimastyrislóg heldur enn fullveldi.

Harra Steinbjørn B Jacobsen! Tygum kunnu skriva, so nógv tygum vilja — men misnýtið ikki demokratiska rætt tín til at taka demokratiska rættin frá øðrum.

»Royn ikki at gera nakað í móti øðrum, sum tú ikki hevði brýggja teg um, at onnur gjørdu í móti tær.«

**Birgir Waag Høgnesen**

# Eitt ljóst hár



Gamalt varð sagt, at eingin ær var so svørt, at ikki okkurt ljóst hár fanst.

Í lítla ritinum Frit Norden hjá felagsskapinum við sama navni prenta teir ikki minni enn tvær greinar við sigandi heitunum »Giv Færøerne samme overgang som Danmark har krævet af EU« og greinina »Ordene 'Fælles valuta' vil gøre eurofolkeafstemningen ulovlig«. Um ríkisfelagsskapin sigur hann her: »Med det kunstige udtryk rigsfællesskabet, som de danske politikere selv har skabt, og aldrig er blevet afgjort, om det betyder et fællesskab mellem tre selvstændige områder.« Greinirnar eru tiknar frá www. torshammer.d. /enmandsavisen, sum Poul Erik Søe skrivar. Fyrra greinin byrjar við: »Vi har selv kæmpet som vilde for at komme lempeligt ind i EF og det indre marked« og mælir so dønum til at geva føroyingum somu treytir, sum teir hava fingið frá ES. Miðjan av greinini má siterast í fullum líki:

»De to danske partier Socialdemokratiets og Venstres helteagtige indsats for danske overgangsordninger skulle kalde på forståelse for de færøske ønsker. Men netop Socialdemokratiet og Venstre er ikke uvildige i forholdet til det færøske folk. Netop de to danske partier spiller sammen med deres søsterpartier på Færøerne. Det danske socialdemokrati spiller de færøske socialdemokraters spil, og de færøske socialdemokrater har altid villet samhørighed med Danmark. Venstre spiller det færøske Sambandsfpartis kort – og Sambandspartiet har jo ligefrem sambåndet, rigsfællesskabet, i sit navn. Netop Nyrup Rasmussens regering sidder udelukkende på den ene socialdemokratiske stemme fra Færøerne. I alle andre sager i samfundet ville Nyrup Rasmussen blive kendt uvildig og ville have været nødt til at holde sig uden for døren, mens forhandlingerne foregik. Men han optræder brovtende, som om han er Danmarks stemme, skønt han alene snakker for sin egen syge moster og med sin korte overgangsordning vil jorde færingernes selvfølgelige ret til selvstændighed.

Og Venstres Anders Fogh Rasmussen ved fra sidste valg, at det netop var stemmerne fra Færøerne, som var afgørende for, at Venstre ikke kom i regeringen, og at hverken Uffe Ellemann-Jensen eller Anders Fogh Rasmussen blev ministre. Det er ikke så sært, at de to gange Rasmussen taler med samme tunge om Færøerne.«

Jógvan Sundstein brúkti sama málburð í sínum frálíka svarið upp á á spurningar frá Jan Müller í Sosialinum herfyri. Og greinin endar:

»Det er en grum krænkelse af det færøske folk, at især Danmarks to største partier synes at have overtaget den færøske valgkamp og omformer Danmarks selvfølgelige hjælpsomhed ved et selvstændigt lands fødsel til en grov ydmygelse af et folk, der i troskab har været fælles med os gennem seks hundred år.«

»At have overtaget den færøske valgkamp«. Júst so. Uttan hjálp og stuðul frá danska Javnaðarflokkinum var »Hin føroyski javnaðarflokkurin« ikki til. Kanska er tað ov nógv at forlanga, at teir skulu vera fyri fullveldi.

Men fullveldisfólk fylkist. Nú er at liggja á takinum. Vit hava tíðina fyri okkum og við okkum. Danir eru avdúkaðir og Hin føroyski javnaðarflokkurin somuleiðis.

Demokratiið í Føroyum hevur altíð verið við mpp hjá Hinum føroyska javnaðarflokkinum. Kanska er tað tí, teir í tíð og úrtíð tosa um demokrati.

Vilt tú hava fult og óskert demokrati í Føroyum, mást tú vera fyri fullveldi.

**Steinbjørn B. Jacobsen**

# Rætting til grein um grindamótmæli

Sosialurin hevur tíverri misskilt viðmerkingar hjá Kate Sanderson í greinini á síðu 4 í blaðnum tann 7. juli viðv. málinum um Watson og danska verjuskipið Hvidbjørnen. Kate Sanderson hevur ikki sagt at hon heldur tað vera ivavert at senda verjuskip við danskari løgrreglu til Føroya. Sum talsmaður fyri Føroya Landsstýri vísti hon á, at Landsstýrið als ikki blandar seg uppí, hvussu donsku løgreglumyndugleikarnar í Føroyum ætla at handfara atferðina hjá Watson í skipi sínum. Tað sum hon heldur er ivasamt er, at fjølmiðlarnar eru við til at hjálpa Watson at øsa málið upp frammanundan við yvirhøvur at gera tíðindi burturúr, at eitt verjuskip er á veg til Føroya, soleiðis sum danskir fjølmiðlar skrivaðu um hósdagin 6. juli.

gult cyan magenta svart



"Einum víkingi dámar at hava nógv at gera"
"Ein víkingur vil vita alt um handil"
"Ein víkingur er álitandi og raskur"
"Ein víkingur vil læra í Miklagarði..."

Hevur tú hug at gerast víkingur?





**Miklagarður í SMS sóknast eftir handilslærlingum at byrja 1. september 2000.**

Í lærutíðini kemur tú runt í allar deildirnar í Miklagarði og fært høvi at royna eitt sindur av hvørjum. Eisini skalt tú á 14-daga skeið, 4 ferðir í lærutíðini.

• Hevur tú FHS-prógv er lærutíðin 3 ár
• Hevur tú HH-prógv er lærutíðin 2 ár
• Hevur tú students- ella HF-prógv er lærutíðin 2 ár og 18 vikur í skúla

Ein handilsútbúgving gevur tær góðar møguleikar fyri persónligari menning og framtíðarmøguleikar tínir eru fleiri. Spyr bara Rannvá, Levi og Dánjal næstu ferð tú vitjar í Miklagarði - tey eru í dag rættir víkingar við leiðandi størvum.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn - **innan 1. august 2000** - við møguligum prógvum og tilmælum til Miklagarð. Tú kanst eisini seta teg í samband við Johnny Priess, um tú vilt hava meira at vita um útbúgvingina.



**Levi Jacobsen**
hevur lært í Miklagarði og varð útlærdur fyri fýra árum síðani. Hann hevur síðani havt ábyrgdina av mjólka- og øðrum drykkjuvørum og hetta dámar honum sera væl.
"*At arbeiða innan handil er praktfult, tí tú kemur í samband við sera nógv fólk*", sigur Levi.
Og Levi er glaður fyri útbúgvingina, tí hon hevur m.a. ført við sær, at hann nú er leiðari fyri Bónus í Klaksvík...



**Dánjal Jespersen**
er í dag "1. maður" og hevur ábyrgdina av kolonialvørum, sum t.d. mjøli, sukuri, kryddaríum og góðgæti. Hann gjørdist liðugur við útbúgvingina fyri skjótt 5 árum síðani, og honum dámar sera væl hetta umhvørvið. Henda útbúgving hevur givið Dánjali breiðan kunnleika innan handilsvinnuna.



**Rannvá Thomsen**
hevur í dag ábyrgdina av frukt og grønt. Hon trívist sera væl í Miklagarði, tí samanhaldið millum starvsfólkið er framúr, umframt at hon kemur í samband við so nógv ymisk fólk.
*"Eftir útbúgvingina varð eg beinanvegin boðin arbeiði her í Miklagarði og eg tók av. Undir útbúgvingini var eg 6 vikur í skúla í Danmark og havi við hesi útbúgving nú møguleika at serútbúgva meg innan ávís handilsøki"*

## Miklagarður - fyrr

*Miklagarður (Konstantinopel) varð grundaður uml. ár 330 av Konstantini tí Stóra, keisara í tí byzantinska ríkinum, sum rakk kring alt Miðjarðarhavið. Víkingar kallaðu býin Miklagarð ella býin mikla. Hann var í miðøldini miðdepil fyri mentan, politikki, trúarlívi og handli. Allur handil til og frá Europa gekk umvegis Miklagarð og har fekst alt tað, ein víkingur kundi ynskja sær.*

## Miklagarður - nú

*Okkara Miklagarður hevur, síðani hann lat upp fyri 22 árum síðani, verið tann størsti matvøruhandilin í Føroyum, við 58.000 viðskiftafólkum um mánaðan. Miklagarður kann bjóða viðskiftafólkum sínum eitt breitt vøruúrval og nógv góð tilboð - hvønn einasta dag. Somuleiðis hevur slaktarin í Miklagarði eisini hópin at feskum kjøti og fiski at bjóða fram. Og grønmeti... ja, Miklagarður strembar eftir altíð at hava friskt grønmeti í sínum diskum.*

*Og hóast meira enn 1600 ár eru millum gamla og nýggja Miklagarð, so er endamálið tað sama - at veita øllum keyparum eitt so breitt vøruúrval og eina so góða tænastu sum gjørligt...*





MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn
Tel 31 30 11